# Havnin hevði farið í luftina

**Tað er ikki nøkur skrøna, tá ið sagt verður, at øll Havnin kundið verið javnað við jørðina, um ein bingja hjá Kaj Andreasen við 16 tonsum av spreingievni, ið stóð á Eystaru Bryggju, fór í luftina**

SPREINGIEVNI

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað ljóðar sum ein skrøna, at allur høvuðsstaðurin skuldi farið í luftina, men so er ikki. Ein góðkendur spreingimeistari, ið Sosialurin hevur tosað við, sigur, at tað als ikki er óhugsandi, at fór bingjan við teimum 16 tonsunum í luftina, var einki eftir av Havnini.



*Um bingjan við teimum 16 tonsunum var farin í luftina, er tað ógvuliga sannlíkt, at meginparturin av Havnini var farin við, sigur góðkendur spreingimeistari*

### Trykkbylgjan hevði verið øgilig

Spreingimeistarin sigur, at 16 tons er ein so ófatiliga stór mongd, og tí er ilt at meta um, hvussu stórar fylgir tað hevði havt.

– Eg minnist tó fyri nøkrum árum síðani, at eg saman við Færøernes Kommando sprongdi ein kassa við 25 kilo av dynamitt og rørleidningum í luftina úti á Glyvursnesi. Tá merktu tey trykkbylgjuna heilt inni á Skálafjørðinum, og í Nólsoy brotnaðu fleiri rútar. Hendan nøgdin, ið stóð á Eystaru Bryggju, var jú fleiri hundrað ferðir størri, og tí er einki at ivast í, at fylgjurnar høvdu verið øgiligar, um bingjan fór í luftina, greiðir spreingimeistarin frá.

### Løgið at eingin boðar frá

Tað undrar tó eisini spreingimeistaran, at Skipafelagið Føroyar, sum hevði bingjuna standandi á sínum øki, ikki hevur heitt á Kaj Andreasen um at flyta spreingievnini av økinum og goymt tá í síni serligu sprengievnisgoymslu.

– Eg veit frá mær sjálvum, at um man ikki fekk stundir at fara oman á bryggjuna eftir spreingievnunum hjá sær, tá ið tey komu mánadag, plagdi Eimskip at ringja dagin eftir og biðja okkum koma eftir tí sum skjótast, sigur spreingimeistarin.

### Eingin viðmerking hjá innflytaranum

Sum áðurnevnt er tað Sp/f Kaj Andreasen í Hoyvík, sum átti bingjuna við teimum 16 tonsunum, ið stóð á Eystaru Bryggju. Bergur Andreasen hjá Sp/f Kaj Andreasen sigur, at í løtuni hava teir ongar viðmerkingar til málið.

– Vit meta málið sum ógvuliga álvarsligt, men í løtuni hava vit ongar viðmerkingar. Vit koma tó við onkrari útmelding seinni, sigur Bergur Andreasen.

Heldur ikki hjá Skipafelagnum Føroyar hava tey hug at gera viðmerkingar til málið. Árni Joensen, stjóri á Skipafelagnum, sigur, at tey hava nakrar heilt greiðar reglur at ganga eftir í slíkum førum, men hann fer annars ikki at gera viðmerkingar til málið í løtuni.

# Vestmenningar brúktu brandlúðurin

**Sunnukvøldið kom eldur í eini sethús í gerð inni á Leiti í Vestmanna. Av tí at útkallingarskipanin hjá alarmsentralinum ikki riggaði, noyddist sløkkiliðsleiðarin í Vestmanna at tendra lúðurin fyri at fáa fatur á monnum**

ELDUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var beint eftir klokkan ellivu sunnukvøldið, at alarmsentralurin fekk boð um, at eldur var í einum sethúsum, sum eru í gerð, inni á Leiti í Vestmanna. Tá ið alarmsentralurin skuldi brúka útkallingarskipanina at fáa fatur á sløkkiliðnum í Vestmanna, riggaði skipanin ikki, og tí var neyðugt at boða frá manuelt.

### Lúðurin kom væl við

Símin Simonsen, sløkkiliðsleiðari í Vestmanna, sigur, at hann sum tann fyrsti fekk boðini frá alarmsentralinum.

– Eg fekk boðini um eldini, og samstundis var sagt, at alarmsentralurin skuldi boða restini av sløkkiliðnum frá. Eg skundaði mær oman á støðina, og eg sá beinan vegin, at tað gekk ov seint at fáa fatur á monnum, tí tað vóru bert nakrir heilt fáir aðrir mans. Tí valdi eg tendra brandlúðurin, sum hoyrist um alla bygdina, og skjótt vóru 16 mans møttir, greiðir Símin Simonsen frá. Sløkkiliðsleiðarin í Vestmanna heldur, at slíkir lúðrar eru ógvuliga hentir at hava, og hann heldur, at allar bygdir áttu at havt ein slíkan.

Tá ið sløkkiliðið kom á staðið, har eldur var, kundu teir tó staðfesta, at onnur fólk har um leiðir høvdu verið skjótari enn teir á staðnum, og tey høvdu við vatni sløkt eldin.

### Kyknaði í ketlinum

Eldurin í nýggju sethúsinum inni á Leiti kyknaði í ketlinum í oljufýringini. Símin Simonsen greiðir frá, at tað brendi út ígjøgnum, og síðani festi tað í tagskeggið og fór nakað inn eftir loftinum.

– Nakrar sperrur eru brendar, men húsini eru ikki smíðað liðug innan. Eigarin er byrjaður at innrætta húsini, men tað arbeiðið er ikki liðugt, greiðir Símin Simonsen frá.



*Eldurin kyknaði í ketlinum, og tað brendi út ígjøgnum. Eisini festi tað í tagskeggið, og nakrar sperrur brendu*

*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*